# Ebenezer verður bygt um





*Stóri salurin í Ebenezer verður bygdur um. Hann fer at rúma um 700 fólkum. Hetta er fyrstu ferð, at húsið verður bygt um síðani 1964*
*( Mynd: Heini S. Kristiansen )*

**Stóri salurin í Ebenezer verður bygdur um. Tey vóna, at arbeiðið verður liðugt tann 1. november. Meginparturin av arbeiðinum verður gjørt ólønt**

EBENEZER
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Samkomuhúsið Ebenezer í Havn hjá brøðrasamkomuni verður bygt um. Ovari salur verður umbygdur. Nýggjur pallur verður gjørdur og balkongin verður eisini umbygd. Balkongin er minkað, og benkurnar verða gjørdar eins og trappur, so at tey, sum sita aftast eisini síggja væl oman á pallin.

Eitt minni rúm er gjørt, sum verður stova. Eisini hava tey gjørt eitt rúm til teknikkin. Salurin fer at rúma um 700 fólkum.

Napoleon Vang er virkin í Ebenezer, og hann letur væl at arbeiðinum:

- Nógv av arbeiðinum verður gjørt ólønt. Gólvið, gongir og veggir hava vit fingið løntar handverkarar at gera, men annars eru tað fólk úr Ebenezer, sum gera alt. Vit halda summarfrí nú, men vit ætla at fara í gongd aftur um hálvan august, sigur Napoleon.

10.000 tímar av óløntari arbeiðsorku

- Vit arbeiða hvønn dag uttan mikudag og sunnudag. Vanliga eru um 20 til 30 fólk hvørt kvøld og hjálpa til. Eg havi rokna út, at tað higartil eru nýttir 10.000 tímar í óløntari arbeiðsorku.

- Vit vildu fegin byggja um, tí at tað trongdi til. Tað er einki gjørt síðani 1964. Tit tíðindafólk tosa altíð um "deadline", og vit hava sett okkara "deadline" til 1. november, tí at tá byrja samfelagsmøtini, sigur Napoleon.

Hitt fyrsta Ebenezerhúsið varð tikið í brúk 17. juli 1905. Í 1932 varð vaksið um húsið, og í 1963-64 varð gamla húsið tikið niður, og núverandi hús varð bygt í staðin. Gamli Ebenezerbygningurin er tann, sum nú stendur í Saltangará. Tað var bygt upp aftur har, og húsið verður nú kallað fyri Berøa.

### Møtir á ólavsøku

Ebenezer liggur í miðbýnum, og har eru nógv fólk, sum ganga framvið. Útimøtini á ólavsøku uttanfyri Ebenezer eru vorðin ein býarmynd. Møtini verða eisini í ár:

- Vit hava útimøtir ólavsøkuaftan og ólavsøkudag. Eisini verður opið hús, sum tey ungu skipa fyri, eftir útimøtið ólavsøkuaftan.

- Tað er stórur aktivitetur á ólavsøku, og her eru eisini nógv full fólk, men øll fara væl um. Vit kunnu ikki klaga um nakrar trupulleikar hasum viðvíkjandi.

# Gracia Burnham í Føroyum

**Fyrrverandi trúboarin Gracia Burnham er í Føroyum á vitjan. Gracia er vorðin kend sum rithøvundur og talari. Hon og maðurin, Martin Burnham, vóru trúboðarar í Filipinunum frá 1986 til 2002. Síðsta árið tey vóru í Filipinunum vóru tey hildin gíslar av Abu-Sayaf**

TRÚBOÐAVITJAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Gracia Burnhams er fyrrverandi trúboðari fyri New Tribes Mission í Filipinunum.

Síðsta árið í Filipinunum vóru hon og maðurin, Martin Burnham, hildin gíslar hjá yvirgangsbólkinum Abu-Sayaf.

Hon hevur skrivað tvær bøkur um hennara upplivingar sum gísli hjá yvirgangsbólkinum Abu-Sayaf. Eisini ferðast hon runt heimin og talar um hennara upplivingar.

### Maðurin doyði

Filipinski herurin var mangan í samanstoytir við Abu-Sayaf. Tann eina skotbardagan var Gracia Burnham og Martin Burnham rakt av skotunum hjá herinum. Yvirgangsmenninir rýmdu og Gracia var bjargað, men maðurin var raktur í bringuna, og hann doyði av løstunum.

Eftir óhugnaligu upplivingina hevur Gracia ferðast runt heimin í 4 ár og greitt frá sínum upplivingum.

- Gud hevur broytt mítt hjarta. Tá ið eg kom heim, kundi eg velja at vera bittur um at maður mín doyði ella glað um at vera bjargað. Gud hevur givið mær styrki til at vent hetta til tað góða. Eg vóni bara, at eg kann vera við til at hjálpa fólkum, sum hava tað ringt, segði Gracia Burnham millum annað á tíðindafundi í Miðlahúsinum í dag.

- Gracia er komin her fyri at geva føroyingum nakað, men hon eisini komin, so at Føroyar kunnu geva henni nakað, segði Ólavur Jøkladal, fyrrverandi trúboðari í Filipinunum.

Gracia Burnham fer at tala í Ebenezer sunnudagin. Týsdagin verður høvuðstiltakið, tá ið hon fer at tala í ítróttahøllini á Eiði. Annars fer hon eisini at halda frí og slappa av í Føroyum.

Meira um Gracia Burnham í Sosialinum mánadagin.



*Gracia Burnham, fyrrverandi trúboðari í Filipinunum, er í Føroyum á vitjan. Hon og maðurin vóru hildin gíslar í eitt ár av yvirgangsbólkinum Abu-Sayaf. Hon var sera kensluborin, tá ið hon greiddi frá tilburðinum, tá ið maður hennara doyði. Nú ferðast hon runt heimin og greiðir frá sínum upplivingum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sannleikans tími:

## Rakt við basaltið

OLJUBORING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað er av álvara sannleikans tími úti á Brugduleiðini á landgrunninum júst í hesi løtu. Borurin umborð á Stena Don rakti seint í gjárkvøldið við trúkku basaltfláirnar í undirgrundini. Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi váttar hesi tíðindi og sigur, at boringin hevur gingið sum ætlað. Tað vóru í gjár 14 dagar síðani, at borururin varð settur í undirgrundina. Tað hevur verið sagt, at basaltið er 1 kilometur tjúkt, men hetta er framvegis óvíst. Komandi dagarnir fara at vísa, hvussu hart basaltið er og harvið hvussu skjótt tað verður at bora niður ígjøgnum. Málið hjá Statoilsamtakinum er at bora umleið 3800 metrar. Hetta er fyrsta oljuboring á landgrunninum í trý ár. Sigurd í Jákupsstovu sigur, at nú er bara at vóna, at tað gongst væl at bora gjøgnum basaltið.